# ágangi



*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

áðrenn eg mussaði hann: “Stuttleika tær nú góði og hugna tær,” hóast eg visti, at hann fór uppá drukk og lá við øðrum kvinnum. Og tað hendi meiri enn so, at eg koyrdi runt í býnum um náttina og leitaði eftir honum, við børnunum á baksetrinum. Hetta sigur mær bara í dag, at eg fór lagt út um míni egnu mørk, og at eg als ikki hevði álit á mær sjálvari ella samband við kenslur mínar longur, sigur Maria, og vermir hendurnar um heita krússið, meðan hon skimast eftir børnunum uttanfyri.

## Lygnin og fasadan

Hóast Maria skammaðist av og royndi at káva út yvir veruliga standin, kundi hon ikki krógva tað fyri vinkonunum og familjuni, og tey heittu ofta á hana um at sleppa sær burtur úr hjúnalagnum.

- Eg brúkti ómetaliga nógva orku til at halda fasaduni uppi, og var tískil eisini altíð móð og óuppløgd. Men um eg helt lygnini uppi, kundi eg eisini sjálv trúgva henni, og um eg hinvegin fortaldi fólki tað, sum veruliga fór fram, so fortaldi eg eisini mær sjálvari tað. So alt var vorðið ein stór lygn, sum eg gjørdi alt fyri at káva útyvir, tí eg skammaðist av, at vera hjá einum manni, sum fór so illa við mær, sigur hon, og staðfestir samstundis, at hon í roynd og veru hevur gloymt ein stóran part av øllum tí, sum fór fram:

- Helst tí at tað ekstrema var so óveruligt, fekk eg meg ikki at trúgva, at eg í veruleikanum var eitt stórt nervavrak, sigur Maria. Og hon greiðir frá, at seinastu árini hon var saman við Sámali, sat hon ikki niðri og prátaði við fólk, tí hon var so rastleys og hevði slíkan fjáltur ár sær.

- Eg gekk í kring og var í einum øðrum heimi. Alla tíðina á varðhaldi. Tí hvat fór at henda nú? Fór hann at koma heim og vera í ringum lag? Skuldi eg gera meg til reiðar? Ella kanska gera ein góðan bita, so hann bleiv glaður? Og fólk, sum kendu meg frá fyrr, søgdu, at eg var als ikki meg sjálv, og at tann sterka og glaða Maria var ikki at kenna aftur, sigur Maria. Og hon vísir á, at hon hevði alla tíðina ein ómetaligan tørv á at fortelja øllum, hvussu eydnurík tey vóru, hvussu nógv hon elskaði Sámal, hvussu góður hann var við hana og børnini og um alt tað góða, sum tey gjørdu saman.

- Í dag veit eg, at hetta bert var enn eitt tekin um, at eg ikki treivst, og at hetta eisini gjørdi, at fólk orkaðu ikki at hoyra uppá meg, tí tey vistu øll, at eg leyg.

## Heima hjá elskarinnuni

Ein sunnumorgun kom Sámal ikki heim. Og Maria gjørdi, sum so ofta fyrr, av at fara út í býin at leita eftir honum. Setti synirnar í bilin og koyrdi til húsini, har tað segðist, at elskarinna hansara búði. Pikkaði á dyrnar og latið varð upp. Har stóð Sámal og spurdi, hvat hon vildi? Maria hugdi bønliga uppá hann og snúði sær oman trappurnar. Útkomin í bilin tók hon avgerðina. Nú var ovboðið, og hon fór beina leið til Kvinnuhúsið, har hon og børnini fingu lívd og stuðul at koma burtur úr hjúnalagnum.

- Fyrstu dagarnar svav eg bara, tí eg var púra útlúgvað, og tá eg royndi at hugsa um tað, sum var hent, hevði eg lukkuliga gloymt alt, greiðir hon frá. Og ein rúm tíð gekk, áðrenn tær í Kvinnuhúsinum fingu sannført Mariu um, at tað, sum hon hevði verið ígjøgnum, í veruleikanum er júst tað sama, sum kvinnur, ið eru fyri kropsligum harðskapi eru fyri: At verða eyðmýktar og vanvirdar, at skammast fyri umheiminum, so tær missa alt sjálvsvirðingina og sjálvsálitið og fara langt út um egin mørk.

- Tá tú hevur likamlig merki, bløðir ella hevur brotið okkurt, er tað lættari hjá umheiminum at góðtaka, at hann er eitt reyvarhol og at sannføra teg um, at tú átti at farið frá honum. Sárini á sinninum eru ikki so ítøkilig, og tískil er eisini lættari hjá tær sjálvari at fortreingja tað. So hvørja ferð eitthvørt hendi, har hann fór yvir um mark hjá mær, eyðmýkti meg ella fekk meg at kveistra egnar kenslur burtur, hugsaði eg bara, at hetta hendi, men lat okkum bara gloyma tað og koma víðari, sigur Maria.

## Ein fjar og kúgað mamma

Í dag býr Maria í Danmark. Hon er gift við Leif, sum er dani, og sum hon eigur tvær døtur saman við. Maria hevði synirnar hjá sær og Sámali við inn í hjúnalagi, og hon kann enn í dag hava ringa samvitsku yvir, at hon lat teir hava eina kúgaða og fjara mammu fyrstu týdningarmiklu árini.

- Eg var heilt víst ikki sálarliga til staðar fyrstu árini av lívinum hjá synunum. Hetta nervar meg nógv, og tí geri eg kanska eisini ov nógv burturúr leiklutinum sum mamma í dag, tí eg kenni tað sum at vit hava nakað at innheinta, sigur Maria, sum í starvi sínum sum sjúkrasystir hevur verið í samband við aðrar kvinnur, sum hava eina søgu, ið líkist hennara.

- Eg havi lisið nógv, prátað við professionell fólk og sum heild veruliga sett meg inn í, hvat tað vil siga at liva í einum parlagi, har sálarligur og annar harðskapur valdar. Og eitt veit eg bara: Tað er ein myta, at kvinnur, sum hava latið seg kúgað, altíð finna sær ein kúgandi mann aftur. Tí tað er ikki altíð soleiðis, og hevur í øllum førum ikki verið galdandi hjá mær, sigur Maria, meðan hon skimast út gjøgnum vindeyga, har tær báðar smáu diddurnar hava fingið karm av havaslanguni hjá abbanum.


inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Hotel Norð - Viðareiði**

Nú er stáðsiliga hotellið á Viðareiði til sølu. Bygningurin er í 2 hæddum – í alt 1100 fermetrar. Grundøkið er heilar 10.000 fermetrar. Byggiár 1975 / 1990. Í niðaru hædd er inngongd, stórt móttøkuhøli, mannfólka- og konufólkawc, fundarhøli til 30 fólk, barr, skrivstova, matstova til 190+90 fólk, líti veitsluhøli / uppihaldsstova til 25 fólk, køkur, grovkøkur, starvsfólkawc, goymslurúm og hjallur. Í ovaru hædd er stór trappuuppgongd, 15 dupultkømur við baðirúmi, minibar og sjónvarpi og lítil privatur køkur og vaskirúm. Hotellið stendur í avbera náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi og hevur sera gott útsýni. Fleiri upplýsingar fáast á www.hotelnord.fo og hjá INNI. Hotellið verður selt, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni



**Havnar KFUK-skótar**

**Vit byrja aftur 28. august**

**Spírur og Títlingar**
mikudag kl. 1630 til 1800

**Skótar og Ungdómsskótar**
hósdag kl. 1900 til 2100

**Spírur**, eru gentur í forskúlaaldri og 1. flokki
**Títlingar**, eru gentur sum ganga í 2. til og við 4. flokki
**Skótar**, eru gentur sum ganga í 5. til og við 8. flokki
**Ungdómsskótar**, eru tey frá 9. flokki og eldri



**Endamálið:**
er at útinna skótaarbeiði samsvarandi alheims skótalóg og skótalyfti og at boða gleðiboðskapin fyri skótum og títlingum samsvarandi evangelisk-luthersku játtanini.

**Arbeiðsgrundarlag:**
er gjøgnum skótaarbeiði at útvega tær best møguligu treytir fyri einum felagsskapi, har frælsi fyri einstaklingin er størst møguligt, samstundis sum ein átekur sær ábyrgd fyri felagsskapinum.
Samsvarandi skótalóg og -lyfti vil skótarørslan, við sínum arbeiði á tjóðskaparligum og alheims stigi hjálpa skótunum at virka fyri góðum vinalagi tjóðanna millum.

Hevur tú hug at gerast KFUK-skóti, ert tú vælkomin í skótahølini í KFUK, Varðagøtu 9 nevndu dagar.